# – Clinton og Blix skulu se

**Føroya Arbeiðsgevarafelag vil skapa eina stóra uppliving, og tí hevur felagið boðið Bill Clinton og Hans Blix til Føroya 24. mai.**
**- Hetta er ein ultimativ staðfesting av Føroyum sum partur av globala heiminum, verður sagt úr Føroya Arbeiðsgevarafelag**

VINNA
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

- Vit tosa um eitt navn í heimsklassa.

- Hann skal geva okkum serligan íblástur á hægsta støði.

- Hetta er ein ultimativ staðfesting av Føroyum sum partur av globala heiminum.

Tað gekk ein løta áðrenn Jan Mortensen, Jóhan Páll Joensen og Magni Arge vegna Føroya Arbeiðsgevarafelag vildu avdúka, hvønn talan var um, tá teir á tíðindafundi í morgun høvdu tosað eina løtu ein "serligan persón", sum skuldi seta Føroyar á heimskortið.

Føroysku fjølmiðlarnir fingu fundarboð seint í gjárkvøldið til tíðindafund uttan yvirskrift.

– Tað er sikkurt Clinton, sum kemur til Føroya, segði onkur í skemti.

Og tað var tað eisini.

24. mai í ár skulu Bill Clinton, fyrrverandi forseti í USA, og sviin Hans Blix, fyrrverandi leiðari fyri vápnaeftirlitið í Irak, halda hvør sín fyrilestur í Norðurlandahúsinum.

Ætlanin er, at teir báðir skula røða í umleið ein tíma hvør, og eftir hetta svara teir spurningum frá fundarfólkinum í hálvan tíma í part.

## Blix steðgar á nakrar dagar

Føroya Arbeiðsgevarafelag er stigtakari til tiltakið. Í gjár stutt fyri náttúrðatíð varð staðfest, at avtalan við World Celebrity Event, ið umsitur fyrilestraroðir hjá Bill Clinton í Evropa, var komin upp á pláss.

Jóhan Páll Joensen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag, helt m.a. fyri, at nú hava vit í Føroyum tosað um visjónir í eini eitt-tvey ár.

- Men okkum í vinnuni dámar betur at handla, segði Jóhan Páll Joensen, og metti, at vit sjálv ofta eru okkara egna forðing, og at tað tí er av týdningi av at fáa slíkar persónligheitir til Føroya.

Enn er skráin ikki fastløgd, og tí bar ikki til at fáa at vita á tíðindafundinum, nær Clinton og Blix koma til Føroya, ella hvørjum teir flúgva við.

Tó er sannlíkt, at Clinton bara verður í Føroyum hósdagin 24. mai, og tí ber ikki til at fáa at vita, um ger nakra útferð. Helst koma Clinton og Blix í sama flogfari til Føroya, men Hans Blix hevur konuna við, so Blix-hjúnini verða væntandi í Føroyum nakrar dagar.

## Fíggjað við luttøkugjaldi

Fyrireikararnir vilja ikki siga, hvussu nógv tað kostar at fáa hesar báðar menninar, sum eru kendir av altjóða politiska pallinum, hendanvegin. Heldur ikki ber til at fáa viðmerkingar viðvíkjandi trygdini. Fyrireikararnir vátta tó, at løgreglan er millum tey fáu, sum eru kunnað um ta fínu vitjanina, og politiið hevur givið grønt ljós.

Tó hevur ljóðað aðrastaðni, at fyrrverandi amerikanski forsetin áður hevur fingið umleið eina millión danskar krónur í samsýning fyri ein einstakan fyrilestur, og sum dømi kann nevnast, at tá Clinton vitjaði í Frederikshavn 29. september í fjør, rindaðu teir 1800 áhoyrararnir frá 2500 krónur í part fyri atgongumerki við døgurða, og tey bíligastu atgongumerkini kostaðu 1495 krónur.



Í Norðurlandahúsinum er tó bert pláss fyri eini 400 fólkum, so kanska hetta ávirkar atgongumerkjaprísin.

## Clinton avgjørdi dagin

Tað er kortini greitt, at tiltakið verður fíggjað við inntøkunum frá luttøkugjaldi, sum fólk frá vinnulívinum helst sleppa at keypa. Talan er ikki um eina politiska vitjan, men Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum váttar, at Jóannes Eidesgaard, løgmaður, er boðin við til fyrilesturin. Eisini nevnir Jóhan Páll Mortensen møguleikan fyri. at føroyingar kunnu bjóða leiðslum í útlendskum fyritøkum hendanvegin at hitta Clinton og Blix.

- Tað primera endamálið er at skapa eina góða upp-

# Forsetavitjan: *So siga tey...*

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum:

## Íløgan kemur fleirfaldað aftur

Bjarni Djurholm hevur ilt við at trúgva tí, tá vit siga honum, at Bill Clinton kemur til Føroyar. Men tá hann verður sannførdur um, at vit ikki arga, sigur hann, at hetta er eitt ómetaliga gott høvi hjá Føroyum profilera okkum vinnuliga

- Hetta er avgjørt nakað, sum setir Føroyar á heimskortið. Tí er tað ein upplagdur møguleiki at marknaðarføra okkum úti í heimið, sigur ein sera fegin Bjarni Djurholm. Hann



heldur, at føroyskt vinnulív fær fleirfaldað meira inn av einari tílíkari vitjan, enn hon kostar.

- Hetta fer at gagna føroyskum vinnulívið í nógv ár framyvir, staðfestir hann.

Uppá spurningin um, hvat Bjarni Djurholm heldur vit kunnu vísa Bill Clinton, sigur hann, at vit hava nógv at vera stolt av.

- Tað gongur væl búskaparliga og vinnuliga, og samstundis hava vit eina góða sosiala skipan. So vit hava onga orsøk at smæðast, sigur Bjarni Djurholm.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður:

## Clinton er ein fantastiskur røðari

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, fekk boðini um at Clinton kemur til Føroya tíðliga í morgun. Hann heldur tað verða sera áhugavert, at Vinnuhúsið hevur megnað at fáa Bill Clinton hendan vegin. Og hann ynskir Vinnuhúsinum hjartaliga tillukku við tí.

- Eisini verður forkunnugt at sleppa at hoyra Hans Blix í sambandi við kríggið í Irak, sum vit hava havt eina serliga støðu til, sigur løgmaður.

Hann heldur, at vitjanin fer at geva Føroyum stóran fyrimun og nógva umrøðu víða um.

- Clinton verður mettur at vera millum teir stóru amerikansku forsetunum. Tí er hetta er eitt gott tekin um, at vit eru komin við í altjóða samanhang. Annars hevði hann ikki ómakað sær við at komið hendan vegin, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann hevur áður hoyrt Bill Clinton røða, og heldur hann vera ein ómetaliga karismatiskan mann við



nógvum áhugaverdum sjónarmiðum.

- Fyrst og fremst er tað spennandi at hoyra, hvussu hann sær heimin. Og so verður tað eisini stuttligt, nú konan stillar upp til forsetavalið, og Hvítu Húsini kanska lata dyrnar upp aftur fyri Clinton hjúnunum, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, við Sosialin.

Høgni Hoydal, formaður Tjóðve

## Upplagt til br av Føroyum

Høgni Hoydal er, umframt løgtingslimur fyri Tjóðveldisflokkin, eisini útbúgvin innan kunning og samskifti. So Høgni sær stórar møguleikar við einari slíkari vitjan, bæði fyri politisku skipanina og í sambandi við branding av Føroyum sum heild.

- Tað er ikki minni enn eitt bragd av Vinnuhúsinum at fáa tílíkar persónligheitir hendan vegin. Um vit bera okkum rætt at, so síggi eg óavmarkaðar møguleikar við vitjanini, sigur Høgni Hoydal, sum eisini vónar, at hon kann hava við sær, at føroyskir politikarar fáa eyguni upp fyri øðrum enn tí heimliga. Eisini tí Hans Blix verður við í fylginum.